# Vársangur

Øssur Berghamar

Øssur Berghamar




1. Várið er komið, tað grønkast í líðum,
heim koma fuglar, ið heilsa tær blítt.
Fara vit skulu mót ljósari tíðum,
tá ið alt landið so fagurt er skrýtt.

2. Myrkar og hugtungar hávetursløtur
køvandi kendust á megi og mátt.
Sólin nú sær yvir fjøll, yvir fløtur,
lívsvónir vinna á dimmari nátt.

3. Vetur var langur og stuttur var dagur,
følnað hvør blóma og stirnað var lund,
titandi smáfuglur reiðrast nú glaður
vaknandi lív eftir vetrarsins blund.

4. Fannir í fjøllum í vavi nú minka,
spælandi smábørn í túninum her.
Støðugt mót sumri hvønn dag fer at kvinka
inntil umsíðir tað hásummar er.

5. Fólk Guds, tað fer móti ljósari tíðum,
várið hitt æviga bíða mær man.
Tá tað av sonnum skal grønkast í líðum,
songurin ljóma, sum tagna ei kann.

6. Tøkk fái Gud fyri ljósið og várið
og fyri lívið, sum fall mær í lut.
Fyri tað náði sum varar alt árið,
og fyri frelsuna tøkk fái Gud!